# Royking bannað

**Tað er ikki loyvt at røkja á stovnum hjá Tórshavnar kommunu. Hetta vekir ónøgd fleiri staðni, men kravið er áfrávíkiligt**

ROYKING
*Heri á Røgvi*

Spurningurin um royking á almennum støðum hevur rættiliga ofta verið uppi at vent seinastu árini. Í Føroyum eins og aðrastaðni er rákið, at roykin er heilsuskaðiligt og størri mun skal vera bannað á almennum støðum.

Í Føroyum hevur rákið eisini tikið við, og landseins og kommunalir myndugleikar hava tikið uppgávuna á seg at skerja roykingina.

Roykjandi starvsfólkið verður trýst út í rúm og krókar til sína dagligu dosis av nikotin fyltum tubbakki.

Í Tórshavnar kommunu er støðan tann, at mentamálanevndin hin 7. juni 2000 gjørdi eingin minni enn at orða ein politik á økinum. Hesin politikkur hevur sett sín dám á stovnar og bygningar hjá kommununi.

Í mars mánað kundu vit lesa um, at Tórshavnar býráð hevði álagt Svimjihøllin at seta eitt roykiforboð í verk. Hetta framgongur av skrivi dagfest 22. februar, har álagt verður, at svimjihøllin skal gerast fullkomiliga roykfrí sum skjótast.

Tað kann so vera ein tulkingarspurningur, hvat orðingarnar merkja, men vit settu okkum fyri at kanna eftir, hvussu er og ikki við royking, svimjing og øðrum almennum.

## Nøkur borð

Svimjihøllin í Gundadali hevur hvønn dag einar 400-500 vitjandi. Um summarið kann hetta talið vera enn hægri. Uttanfyri svimjihøllina liggja eisini hópin av sigaretstubbum sum prógv fyri, at her hava roykjarar verið í nánd. Beinanvegin tú kemur innar, gerst tað greitt, at hetta er vandaøkið fyri ein og hvønn roykjarara. Royking er bannað stendur skilliga frámerkt, og dreymurin um heilsu og nikotin sløknar eins skjótt og sigarettin.

Í svimjihøllini starvast átjan fólk, og hesi hava fingið ein krók, har tey kunnu sleppa at roykja. Hetta hevur vakt eitt sindur av ampa hjá roykjandi partinum av starvsfólkunum. Tey eru kortini ikki so nógv í tali, vita tey at siga í Svimjihøllini.

Talan er heldur um eitt fullkomilig roykiforboð, tí í kantinuni eru nøkur borð, har roykjarar kunnu sita og festa sær í. Har er eingin serstøk útsúgving ella annað, og hetta hevur heldur ongantíð veri.

Áður hevur tað verið soleiðis, at loyvt hevur verið at roykja allastaðni í høllinum uttan í sjálvum hilinum og skiftirúminum. Nú er tað soleiðis, at roykingin í øllum er skerd í Svimjihøllini í Gundadali.

## Forboð

Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at Tórshavnar kommuna hevur tann politikk á økinum, at ikki skal kunna roykjast, har almenningurin hevur atgongd. Í førinum við Svimjihøllini er talan um eitt heisustað, har tað ikki verður mett hóskandi, at fólk festa sær í.

Hetta segði Jan Christiansen í mars mánað í ár.

Á Snarskivuni hjá Tórshavnar kommuna angar væl. Snarskivan hevur høli saman við Postverki Føroya á Vaglinum. Har er heldur ikki loyvt at roykja. Starvsfólkið hevur fingið eitt tillutað eitt høli, har tey sleppa at roykja. Somu treytir hava onnur í umsitingini hjá kommununi.



*Tórshavnar kommuna legði hart út og álegði Svimjihøllini í Gundadali roykiforboð*


*Svimjihøllin í Gundadali er eitt heilsustað, og har verður ikki loyvt at roykja. Men nøkur borð í kantinuni sleppa undan forboðnum. Annars verður roykurin hildin uttanfyri*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu okkum samkenslu og hjálpsemi,
tá ið høgt elskaða mamma og omma okkara

**Julia Thomsen**

andaðist og varð jarðað.

Takk til Sverra Steinhólm, Margair Toftegaard og Una Næss fyri troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni, eisini ein serstøk tøkk til tykkum báðar, Bjarnhild og Signhild fyri tykkara stóru hjálp heima.

Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og tøkk fyri blómur og kransar, tøkk til øll, ið á ein ella annan hátt hjálptu til. Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Oluf, Gunnleif, Olgar, Paula og Gunnvá**

# Nýggj andlit mynda nevndir

TÍÐINDASKRIV

Nevndin í Ráfiskakeyparafelagnum og KT-felagnum hava skipa seg.

Á fyrsta nevndarfundinum skipaði nevndin í Føroya Ráfiskakeypara-felag seg við Egil Olsen sum formanni og Adrian Dalsá sum næstformanni. Hinir í nevndini eru Páll Gregersen, Meinhard Jacobsen og Petur Mohr. 3 av nevndarlimunum - Adrian, Meinhard og Petur – er nýggjir í nevndini.

Nýggja nevndin í KT-felagnum hevði eisini fyrsta nevndarfund í farnu viku. Nevndin skipaði seg við Robert Vilhelmsen sum formanni og Ólavur Ellefsen sum næstformanni. Triði nevndarlimurin er Sjúrður Horsdal.


*Egil Olsen formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag*




# Starvsfólk til Burger King í SMS



## Aftaná skúlatíð

Søkt verður eftir 14 fólkum M/K at arbeiða nakrar tímar um vikuna - eftir skúlatíð og í vikuskiftunum. Størvini verða sett frá 7. oktober 2002.

**Eitt sera vælegna starv hjá teimum lesandi.**

Ert tú opin, virkin og røkin, so ert tú kanska ein av teimum, vit leita eftir. Vit vænta, at tú eins og vit eru tilreiðar at veita kundum okkara eina skjóta og góða tænastu. Vit læra teg á staðnum...

## Hálva tíð

Søkt verður eftir 6 fólkum M/K at arbeiða hálva tíð - um dagin, kvøldið og í vikuskiftunum. Størvini verða sett frá 4. oktober 2002. Ert tú opin, virkin og røkin og dámar væl at arbeiða við fólkum, so er hetta júst nakað fyri teg. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði við nógvum starvsfólkum í einum nógv vitjaðum umhvørvi. Vit bjóða tær eitt langt vikuskifti í Svøríki, har tú fært upplæring hjá Burger King...

## Fulla tíð

Søkt verður eftir 8 fólkum M/K til fulltíðarstarv í Burger King. Størvini verða sett frá 15. september 2002. Ert tú opin, virkin og røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit senda teg til Svøríkis í 3 vikur, har tú fært útbúgving hjá Burger King. Eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til: Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.**
**Tað ber eisini til at søkja beinleiðis á internetinum - hygg á www.sms.fo**
**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. juli 2002.**

petur & petur • 320870

**Burger King • SMS • Postboks 1059 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 30 41**

® Burger King and Whopper are registered trademarks of the Burger King Corporation